# Um at samskipa politisk mál

Sambært stýrisskipan Føroya § 33, stk. 2 samskipar løgmaður starv landsstýrismanna og boðar í hesum sambandi regluliga til landsstýrisfundar, har m.a. øll uppskot landsstýrisins til løgtingslógir, ríkislógartilmæli o.a. verða løgd fram, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið.

Landsstýrisfundir eru sostatt ásettir í stýrisskipanini og eru týdningarmesta amboðið at fáa heild og samanhang í politikkin og ikki minst til tess at tryggja samljóð í landsstýrinum.

Landsstýrisfundirnir eru kjarnin í landsstýrisarbeiðinum.

**Landsstýrisfundir**
Endamálið við regluligum landsstýrisfundum er, at løgmaður samskipar politikk landsstýrisins og tryggjar landsstýrinum hóskandi kunning og møguleika at umrøða og viðgera týðandi viðurskifti og mál, ið skulu fara fram á ymsu málsøkjunum.

Løgmaður skipar landsstýrisfundirnar. Er løgmaður burturstaddur ella av øðrum orsøkum hevur forfall, skipar varaløgmaður fyri fundunum. Umframt landsstýrismenninar eru løgmansstjórin og/ella annað starvsfólk á Løgmansskrivstovuni á fundunum.

Tá ið árliga fíggjarlógaruppskotið er fyri á landsstýrisfundi, er aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum og/ella annar í hansara stað eisini til staðar undir viðgerðini av málinum.

Í serligum førum kann landsstýrismaður, eftir avtalu við løgmann, hava embætisfólk ella onnur við á fundin.

Tá ið løgtingsmál er klárt at leggja fyri Løgtingið, tekur Løgmansskrivstovan stig til formligan landsstýrisfund samsvarandi stýrisskipan Føroya § 33, stk. 2.

**Møtiskylda**
Landsstýrismenn hava møtiskyldu. Góðar grundir skulu vera fyri ikki at møta, t.d. arbeiðsørindi uttanlands. Fær landsstýrismaður ikki møtt á fundi, skal Løgmansskrivstovuni boðast frá hesum í góðari tíð.

**Mál**
Á landsstýrisfundi eiga mál sum hesi at verða løgd fyri:

- Uppskot til lógir og samtyktir at leggja fyri Løgtingið
- Uppskot til kunngerðir
- Fíggjarlógaruppskot, eykafíggjarlóg, eykajáttanarlógir og fíggjarnevndarskjøl
- Tvørgangandi rundskriv
- Frásagnir at leggja fyri Løgtingið um týdningarmikil viðurskifti og evni, t.d. frágreiðingar um vinnupolitikk, búskaparpolitikk, almannapolitikk, fiskivinnupolitikk o.t.
- Løgmansfrágreiðing og løglisti
- Mál til aðalorðaskifti

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – Fax: (+298)306015 – e-mail: info@tinganes.fo - www.tinganes.fo

- Størri politiskar ætlanir, tiltøk ella fundir, ið hava víðfevnandi ella altjóðalig eyðkenni
- Mál, ið gerast áleikandi, tí tey t.d. við eitt fáa politiskan týdning og/ella verða viðgjørd í fjølmiðlunum, og sum landsstýrið má hava eina felags støðu til
- Stovnan av nevndum og ráðum og broytingar í teimum (eisini galdandi fyri almenn partafeløg)
- Setan av almennum stjórum
- Størri bygnaðarbroytingar, heruppií at stovna, niðurleggja ella flyta  stovnar

**Viðgerð**
Til tess at fáa eina nøktandi viðgerð á landsstýrisfundi er neyðugt, at avvarðandi stjórnarráð fyrireikar málið, um neyðugt eisini tvørvegis av stjórnarráðunum, áðrenn tað kemur fyri á landsstýrisfundi.

Viðgerð á landsstýrisfundi verður sum meginregla grundað á skrivligt tilfar sum upprit, álit ella lógaruppskot.

Skrivligt tilfar um mál, ið eisini fevnir um ella fær avleiðingar fyri málsøki hjá øðrum landsstýrismanni, skal hava møguligar viðmerkingar frá viðkomandi stjórnarráði ella átekning frá tí ráði um, at ongar viðmerkingar eru.

Er ætlanin, at politisk støða skal takast til málið, eigur skrivliga tilfarið at lýsa tað, ið landsstýrismaðurin ætlar. Ætlar landsstýrismaðurin einans at gáa eftir, hvørja hugsan landsstýrið hevur um ávísar spurningar, áðrenn landsstýrið sjálvt tekur samanum, er ikki neyðugt, at niðurstøðan er eins ítøkilig.

Mál um størri bygnaðarbroytingar og flyting av stovnum skulu áðrenn politiskan landsstýrisfund leggjast fyri bygnaðarbólk løgmans, sum ummælir broytingar í uppskoti (sí "Fráboðan um býti av málsøkjum" §7). Ummæli verður latið løgmanni og sent til avvarðandi stjórnarráð.

Landsstýrið tekur meginregluliga ikki felags avgerðir í einstøkum málum. Landsstýrið sameinir sjónarmið og viðger viðurskifti og mál, ið løgmaður ella landsstýrismaður einsamallur ger av.

**Frásøgn og kunning**
Ein stutt avgerðarfrásøgn við niðurstøðum verður skrivað og send landsstýrismonnunum og aðalstjórunum í trúnaði við tilfarinum til næsta landsstýrisfund.

Eftir formligan landsstýrisfund letur løgmaður út kunning á lms.fo um, hvørji mál landsstýrið fer at lata Løgtinginum at viðgera.

**Serligir landsstýrisbólkar**
Í serliga torførum politiskum málum kann bólkur av landsstýrismonnum, til dømis ein frá hvørjum samgonguflokki, verða settur at greiða mál til tess at lætta um viðgerðina á landsstýrisfundi. Tá skal embætisfólk helst vera til staðar fyri m.a. at staðfesta niðurstøður frá fundunum.

**Mannagongdir**
Tað er umráðandi, at málini eru væl fyrireikað og gjølla viðgjørd bæði politiskt og fyrisitingarliga, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið. Tí verður henda mannagongd at fylgja:

1. Áðrenn farið verður undir at evna til lógaruppskot, skal landsstýrismaðurin tryggja sær, at høvuðsendamálið við uppskotinum samsvarar við politikk landsstýrisins á økinum. Landsstýrismaðurin skrivar eitt stutt orðað og nágreiniligt upprit. Leisturin: "Upprit til landsstýrisfund" verður brúktur.

2. Hvønn hósmorgun kl. 8.30 er samskipandi fundur til landsstýrisfundin á stjóraráðsstigi. Løgmansskrivstovan ger skrá, og skráin verður, saman við landsstýristilfari, send stjórnarráðunum mikudag. Tilfar til landsstýrisfund skal vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi **mikumorgun kl. 9.00.**

3. Politiskur landsstýrisfundur er hvønn mánamorgun kl. 9.00. Løgmaður ger av, hvørji mál verða sett á dagsskrá. Skráin verður send landsstýrisfólkunum saman við tilfarinum áðrenn kl. 12.00 fríggjadag. Mál, ið ikki eru fráboðað, kunnu ikki væntast viðgjørd.

4. Avger landsstýrisfólk at arbeiða víðari við málinum, eftir at tað hevur verið fyri á politiskum landsstýrisfundi, verður lógaruppskot evnað til. Í hesi tilgongd skal landsstýrisfólkið tryggja politiska undirtøku.
Stjórnarráðið hevur ábyrgdina av, at uppskotið er í lagi málsliga, innihaldsliga og sambært rundskrivinum um lógarsmíð og § 37 í Tingskipan Føroya løgtings.

5. Stjórnarráðið skal tryggja, at lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá viðkomandi pørtum við hóskandi freist, og at tað er løgfrøðiliga og málsliga lýtaleyst.

6. Uppskot skulu latast til eftirkanningar hjá Lógartænastuni, eftir at hesi hava verið til hoyringar, og áðrenn tey verða løgd fyri politiskan landsstýrisfund. Stjórnarráðini skulu hava lagt upp fyri møguligum viðmerkingum frá Lógartænastuni, áðrenn uppskot verða løgd fram á politiskum landsstýrisfundi. Sí "Rundskriv um eftirkanning".
Er avvarðandi stjórnarráð ósamt við grundleggjandi løgfrøðilig viðurskifti í tilmælinum frá Lógartænastuni, eigur stjórnarráðið at venda sær til Lógartænastuna hesum viðvíkjandi. Uppskot, sum ikki eru eftirkannað, kunnu bert verða løgd fyri Løgtingið í samráð við løgmann. Sí "Rundskriv um eftirkanning."
Er talan um viðbrekið mál, kunnar landsstýrisfólkið á landsstýrisfundi um málið, áðrenn tað verður sent til ummælis.

7. Lógaruppskot, sum viðvíkja landsins roknskaparverki, skulu sambært kunngerð um roknskaparverk landsins o.a. góðkennast av Gjaldstovuni. Fevnir uppskotið um ella fær tað avleiðingar fyri málsøkið hjá øðrum landsstýrismanni, skal tað latast avvarðandi stjórnarráði til ummælis.

8. Lógaruppskotið verður lagt fram á politiskum landsstýrisfundi. Tá tað skal á skrá, skal tað sendast Løgmansskrivstovuni á fundur@tinganes.fo í seinasta lagi kl. 9.00 mikumorgun fyri fundin mánadag.

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – Fax: (+298)306015 – e-mail: info@tinganes.fo - www.tinganes.fo

9. Er niðurstøðan á politiskum landsstýrisfundi, at uppskot skal leggjast fyri Løgtingið, verður tað sett á skrá til formligan landsstýrisfund. Løgmaður avger í hvørjum einstøkum føri, um uppskot skal sendast samgonguflokkunum til kunningar og møguligar viðmerkingar. Um so er, sendir Løgmansskrivstovan uppskotið til samgonguflokkarnar við telduposti og møguligar viðmerkingar frá flokkunum verða eisini sendar við telduposti. Freistin at gera viðmerkingar er vanliga 10 dagar. Løgmansskrivstovan kunnar avvarðandi stjórnarráð um møguligar viðmerkingar frá flokkunum.

10. Tá ið uppskot er staðfest á formligum landsstýrisfundi, verður tað uttan drál latið Løgtinginum. Verða broytingar (tó ikki málsligar) gjørdar av landsstýrismanni í uppskoti til løgtingslóg, ríkislógartilmæli, samtyktar ella fíggjarnevndarskjal, eftir at uppskotið hevur verið á formligum landsstýrisfundi, skal uppskotið aftur á formligan landsstýrisfund áðrenn framløgu. Um landsstýrisfólk ger av at taka aftur uppskot úr Løgtinginum, skal Løgmansskrivstovan fáa boð um hetta beinanvegin.
11. Tá ið lógaruppskotið er klárt at leggja fyri Løgtingið, verður tað í endaligum líki sent til formfundur@tinganes.fo við átekning um, at tað er klárt at leggja fyri formligan landsstýrifund. Eftir formliga landsstýrisfundin boðar Løgmansskrivstovan stjórnarráðnum frá, at uppskotið er greitt at lata Løgtinginum.

12. Avvarðandi stjórnarráð avgreiðir beinanvegin lógaruppskotið til Løgtingið og letur samstundis Løgmansskrivstovuni í telduposti til formfundur@tinganes.fo avrit av uppskotinum, eisini tá tað hevur fingið løgtingsnummar áteknað.

Hetta kemur í staðin fyri “Samskipa politisk mál” frá 24. november 2015.

Í Tinganesi 28. juni 2018

Aksel V. Johannesen
løgmaður

/

Marjun Hanusardóttir
løgmansstjóri

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – Fax: (+298)306015 – e-mail: info@tinganes.fo - www.tinganes.fo